# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 01. apríl 2019
Mál nr.: 18/00344
Málsviðgjørt: HKV
Eftirkannað:

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin)** (Dagføringar av lógini)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin)
(Dagføringar av lógini)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn (Realin), sum broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 16. mai 2006, løgtingslóg nr. 122 frá 22. desember 2010 og løgtingslóg nr. 123 frá 7. desember 2012, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
“Endamál stovnsins er at veita vinnulán við veð í førum og flótandi eindum við heimstaði í Føroyum, til nýbygging, umbygging, keyp og sølu umframt umfígging.”

**2.** § 1, stk. 2, verður orðað soleiðis:
“Í undantaksføri kunnu lántakarar hjá Realinum í eitt tíðarskeið skráseta før og flótandi eindir í fremmandari skipaskrá, tó í mesta lagi 12 mánaðir.”

**3.** § 1, stk. 4 verður orðað soleiðis:
“Stk. 4. Kravið um heimstað í Føroyum, sum er ásett í § 1, stk. 1, 2. pkt. er ikki galdandi fyri:
1) før og flótandi eindir innan umveldisvídd Hoyvíkssáttmálans, um farið ella flótandi eindin hevur virkisstað í Føroyum, og
2) eigarin av farinum ella flótandi eindini er fevndur av Hoyvíkssáttmálanum og hevur heimstað innan umveldisvídd sáttmálans.”

**4.** Í § 1, stk. 5, verður “2 og” strikað.

**5.** § 2 verður orðað soleiðis:
“**§ 2.** Stovnurin verður stjórnaður av einari nevnd, sum hevur tríggjar nevndarlimir, ið landsstýrismaðurin tilnevnir. Nevndin hevur ábyrgd

mótvegis landsstýrismanninum fyri leiðsluni av stovninum.
*Stk. 2.* Limirnir í nevndini skulu tilnevnast soleiðis, at nevndin samanlagt hevur neyðuga vitan og royndir til at tryggja, at avgerðir verða tiknar á haldgóðum grundarlag.
*Stk. 3.* Tilnevningin er fyri 4 ár í senn, tó verða ikki allir tríggir nevndarlimir tilnevndir samstundis. Tilnevnt verður annaðhvørt ár soleiðis, at aðruhvørja ferð verða tveir limir valdir og aðruhvørja ferð verður ein limur valdur. Neyvari reglur í sambandi við tilnevning av nevndarlimum verða ásettar í viðtøkunum.
*Stk. 4.* Nevndarlimur situr tilnevningarskeiðið ella til nýggjur nevndarlimur verður tilnevndur í hansara stað.
*Stk. 5.* Nevndin setir stjóra til at stjórna dagligu leiðslu stovnsins. Landsstýrismaðurin skal kunnast um setanina av stjóra.
*Stk.* 6. Stjórin setur metingarmenn eftir góðkenning frá nevndini."

**6.** § 3, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Vald verður umboðsnevnd, ið virkar ráðgevandi fyri nevndina hjá stovninum. Ráðgevandi umboðsnevndin hevur 8 limir, 2 valdir av landsstýrismanninum, 2 av lántakarum stovnsins, 1 av Føroya Reiðarafelag og 1 av Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, meðan Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið eru saman um at velja 2 limir."

**7.** Í § 3, stk. 2, verður "Stjórnin" broytt til "Nevndin".

**8.** Í § 4 verður "stjórnini" broytt til "nevndini".

**9.** Í § 5, stk. 1, verður "Stjórar, undirstjórar og metingarmenn" broytt til "Nevndarlimir, stjóri og starvsfólk".

**10.** § 5, stk. 2 og 3 verða strikað, og stk. 4, sum verður stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Eingin nevndarlimur, stjóri ella grannskoðari hjá stovninum kann taka lán frá stovninum. Heldur ikki kunnu feløg, ið nevndarlimur ella stjóri beinleiðis ella óbeinleiðis hava avgerandi ávirkan á, taka lán frá stovninum."

**11.** § 6 verður orðað soleiðis:
"**§ 6.** Eginogn stovnsins er tann í § 1, stk. 3, nevnda eginogn umframt rakstrarúrslit stovnsins síðan yvirtøkuna til føroyskt málsøki. Eginognin er býtt upp í ein høvuðsgrunn og ein eykagrunn. Í eykagrunnin verða løgd stovnsins rakstraravlop. Fer eykagrunnurin upp ella niður um mørkini sett í stk. 2, kann munurin verða javnaður umvegis stovnsins høvuðsgrunn.
*Stk. 2.* Eykagrunnurin skal í minsta lagi vera 10% av útlánum stovnsins og 20% av stovnsins skuld.
*Stk. 3.* Peningurin í eykagrunninum kann ikki verða læntur út, men skal umsitast samsvarandi íløgumannagongdini fyri gjaldførinum hjá Føroya Landsstýri."

**12.** § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Stovnurin kann útvega sær útlánspening við vanligari lántøku, og við útgávu av skuldarbrøvum ella lánsbrøvum ljóðandi uppá stovnin samsvarandi reglunum í viðtøkum stovnsins."

**13.** Í § 7, stk. 2, verður "øllum stjórnarlimunum" broytt til "allari nevndini".

**14.** Í § 7, stk. 3, verður "fimmfalda grundfæið" broytt til "eina upphædd, ið samsvarar við høvuðsgrunnin".

**15.** Í § 7, stk. 4, verður “stjórnini” broytt til “nevndini og Landsbanka Føroya” og “sjeyfalda grundfæið” broytt til “hægri enn høvuðsgrunnurin, tó í mesta lagi 2 ferðir høvuðsgrunnin”.

**16.** Í § 7, stk. 5, verður “grundfæ” broytt til “høvuðsgrunnin”.

**17.** § 7, stk. 6, verður orðað soleiðis: “Stovnurin ráðførir seg við Landsbanka Føroya í sambandi við útvegan av útlánspeningi sambært stk. 1.”

**18.** § 8, stk. 1, verður orðað soleiðis: “Lánstreytir herundir lánsupphæddir, renta, eykagrunsgjald, afturgjaldingartíð og aðrar treytir verða ásettar av nevndini sambært teimum reglum, ið ásettar eru í viðtøkunum. Afturgjaldstíðin av lánunum kann ikki vera longri enn 15 ár. Nevndin kann tó í afturgjaldingartíðini, um serligar umstøður tala fyri tí, loyva at avdráttir verða lækkaðir ella at gjaldsfreist verður veitt, soleiðis at afturgjaldingartíðin verður longd til í mesta lagi 20 ár.”

**19.** § 8, stk. 4-7 verða orðað soleiðis:
“*Stk. 4.* Farið kann verða upp um tey í stk. 2 og 3 nevndu lánihámark, tá veðsettar ognir, ið eru yvirtiknar á tvingsilssølu ella undir líknandi umstøðum, verða seldar aftur, um sleppast kann undan óneyðugum fíggjarmissi á hendan hátt.”
*Stk. 5.* Um útlitini hjá lántakara gera, at ein slík avtala er til fíggjarligan fyrimun fyri stovnin, kann stovnurin undir serligum umstøðum strika skuld hjá lántakara og gera aðrar kreditoravtalur, herundir eisini avtalur, ið innibera, at stovnurin fyribils kemur at reka annað virksemi enn tað, sum er ásett í §1.
*Stk. 6.* Stovnurin kann ikki veita lán til ein lántakara ella ein bólk av sínámillum samanbundnum lántakarum innan sama samtak (konsern) sambært vinnufelagslóggávuni, ið fara upp um 25% av stovnsins ognum (høvuðsgrunn og eykagrunn). Um farið verður uppum nevnda mark, skal stovnurin beinanvegin fráboða hetta til uttanhýsiseftirlitið sambært § 13, sum kann geva stovninum eina freist til aftur at fáa viðurskiftini í samsvar við markið uppá 25%.
*Stk. 7.* Til játtan av láni krevst undirskrift av í minsta lagi tveimum nevndarlimum.”

**20.** Í § 8, stk. 8, verður “stjórnin” broytt til “nevndin”.

**21.** § 8, stk. 9 og 10 verða strikað.

**22.** Í § 9, stk. 2, verður “stjórnini” broytt til “nevndini” og “veðbrævatreytunum” verður broytt til “lánsskjølunum”.

**23.** § 10 verður strikað.

**24.** § 13 verður orðað soleiðis:
“**§ 13.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum. Landsstýrismaðurin kann gera avtalu við avvarðandi landsstýrismann um, at Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við stovninum.”

**25.** § 14 verður orðað soleiðis:
“**§ 14.** Stovnurin ger á hvørjum ári eina ársfrásøgn, sum skal hava eina leiðslufrágreiðing, leiðsluátekning og ein ársroknskap við fíggjarjavna, rakstrarroknskapi, notum, undir hesum frágreiðing um nýtta roknskaparsiðvenju. Grannskoðaraátekningin av ársroknskapinum inngongur í ársfrásøgnina.
*Stk. 2.* Roknskaparár stovnsins gongur frá 1. januar til 31. desember.
*Stk. 3.* Ársfrásøgnin skal gerast samsvarandi reglunum í Ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki

D.
*Stk. 4.* Nevnd og stjórn hava ábyrgdina av at ársfrásøgnin fyri stovnin verður gjørd samsvarandi reglunum um hetta í ársroknskaparlógini.”

**26.** § 15 verður orðað soleiðis:
“**§ 15.** Ársroknskapurin skal grannskoðast av uttanhýsis grannskoðara stovnsins, sum verður valdur av nevndini. Grannskoðarin skal vera løggildur. Grannskoðanarskyldan fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina og aðrar ískoytisfrágreiðingar, sum eru partar av ársfrásøgnini. Grannskoðarin skal kortini geva eina váttan um, hvørt upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini samsvara við ársroknskapin.”

**27.** § 16 verður orðað soleiðis:
“**§ 16.** Góðkenda ársfrásøgnin, sum fevnir um grannskoðaða ársroknskapin, leiðslufrágreiðing og leiðsluváttan verður løgd fyri umboðsnevndina til ummælis og síðani send landsstýrismanninum saman við viðmerkingum grannskoðarans í seinasta lagi 4 mánaðir eftir roknskaparlok.
*Stk. 2.* Í seinasta lagi 2 mánaðar eftir hvørt fjórðingsárslok sendir stovnurin landsstýrismanninum roknskap fyri farna ársfjórðingin.
*Stk. 3.* Stovnurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men virksemið hjá stovninum verður ikki tikið við í løgtingsfíggjarlógina.”

**28.** § 16 a. verður orðað soleiðis:
“**§ 16 a.** Føroya Realkreditstovni verður heimilað at rinda landskassanum part av ársúrslitinum eftir skatt sambært nærri ásetingum í viðtøkunum.”

**29.** § 18, stk. 2 og 3 verða strikað.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Núverandi nevnd situr skeiðið út og við fyrsta komandi nevndarval tilnevnir landsstýrismaðurin tveir limir fyri 4 ár og ein lim fyri tvey ár.
*Stk. 3.* Roknskaparárið 2019 gongur frá 1 apríl 2019 til 31. desember 2019.
*Stk. 4.* Núverandi umboðsnevnd situr skeiðið út.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið.

Føroya Realkreditstovnur (Realurin) varð stovnaður av danska Fólkatinginum í 1955, men í 1998 samtykti Løgtingið at yvirtaka Realin, sum síðani tá hevur verið reguleraður og stýrdur av føroyskum myndugleikum.

Tá Realurin varð yvirtikin, vórðu onkrar broytingar og tillagingar gjørdar í lógini, men tað eru framvegis fleiri ásetingar og viðurskifti í lógini, sum stava frá 1955, tá Realurin upprunaliga varð stovnaður, og lógin um Realin er sostatt á fleiri økjum frá einari farnari tíð.

Endamálið við hesum uppskoti er at gera neyðugar tillagingar og dagføringar í lógini um Realin, soleiðis at ásetingarnar um stovnin koma at vera í betri samljóði við samtíðina.

Tryggingareftirlitið, Landsgrannskoðanin og Realurin sjálvur hava eisini havt ynski um broytingar, ið hædd verður tikin fyri í hesum lógaruppskoti.

### 1.2 Endamálið við Realinum (§1)

Endamálsorðingarnar við Realinum eru ásettar í §1 í lógini, og her verður mælt til at gera nakrar tillagingar og dagføringar.

Endamáls og fíggingar heimildirnar hjá Realinum kunnu virka bæði ógreiðar og ivasamar. Tað er ítøkiliga ásett, hvørjar skipabólkar Realurin kann fíggja, men landsstýrismaðurin hevur samstundis heimild til at víðka útlánsvirksemið til aðrar vinnugreinar. Henda heimildin hevur verið brúkt nakrar ferðir, men heimildin hevur altíð reist nógvan iva, tí hon hevur givið landsstýrismanninum heimild til at víðka útláns møguleikarnar hjá Realinum út um heimildirnar, sum longu eru ásettar í lógini.

Við hesum lógaruppskotinum verður endamálið og heimildirnar hjá Realinum gjørdar greiðari og ruddiligari. Heimildin hjá landsstýrismanninum at víðka útlánsvirksemið verður strikað, samstundis sum endamálið og lánsheimildirnar verða meira yvirskipaðar til at fevna um vinnulán til øll før og flótandi eindir við heimstaði í Føroyum, soleiðis at møguligir skipabólkar ikki verða útihýstir frá at fáa fígging frá Realinum.

Tað hava onkuntíð verið ivamál um, hvørji endamál Realurin kann veita fígging til. Tí ásetir uppskotið harumframt, hvørji endamál Realurin kann veita fígging til, nevniliga til nýbygningar, umbygging, keyp og sølu umframt umfígging.

Skotið verður eisini upp, at Realurin, í undantaksføri og í styttri tíðarskeið upp til 12 mánaðir, fær heimild til at loyva lántakarum hjá Realinum, at taka skip úr føroysku skipaskránni og skráseta skipið í fremmandari skipaskrá.

Føroysk skip hava av og á tørv á at fiska kvotur aðrastaðni og ikki undir føroyskum flaggi. Sambært føroyskari lóggávu er møguleiki fyri, at føroysk skrásett skip kunnu leiguskrásetast í øðrum landi og harvið bera fremmant flagg, samstundis sum skipið er skrásett sum ogn hjá føroyskum felag í føroysku skipaskránni. Hetta er treytað av, at fremmanda skrásetingin hevur eins reglur, sum í Føroyum, men tað er tó sjáldan, at so er. Tí er í flestu førum neyðugt, at skipið verður strikað í føroysku skipaskránni og skrásett av nýggjum í fremmandu skránni.

Realurin metir seg ikki hava heimild til at fíggja skip, sum verða tikin úr føroysku skipaskránni, og tað hevur víst seg at verið óheppið, tá ið lántakarar hjá Realinum hava verið noyddir at taka skip úr føroysku skipaskránni fyri at skráseta skipið undir fremmandum flaggi í styttri tíðarskeið.

**1.3 Leiðsla stovnsins (§2 – 5)**
Realurin verður stjórnaður av einari stjórn, ið telur tríggjar limir, ið tilnevna ein undirstjóra. Realurin hevur sostatt tríggjar stjórar, ið tilnevna ein undirstjóra at taka sær av dagligu leiðsluni av stovninum. Hetta verður mett sum ein leivd frá einari farnari tíð, tí stjórnin virkar í veruleikanum sum ein nevnd, meðan undirstjórin virkar sum stjóri. Mælt verður tí til at dagføra heitini soleiðis, at núverandi stjórn verður broytt til nevnd og undirstjórin verður stjóri.

Samstundis verður eisini mælt til, at tilnevningin av nevndini verður stytt úr 5 árum niður í 4 ár í senn. Eisini verður mett skilagott, at ikki øll nevndin verður skift út í senn. Tí verður ásett, at nevndarlimir verða valdir annaðhvørt ár soleiðis, at aðruhvørja ferð verða tveir limir valdir og aðruhvørja ferð verður ein limur valdur. Soleiðis umskarast tíðarskeiðini og størri kontinuitetur fæst í nevndararbeiði.

Setanarviðurskiftini verða somuleiðis broytt soleiðis, at tað verður stjórin, ið setir og loysir fólk úr starvi, sum vanligt er í dag. Tó verður tað soleiðis, at stjórin setur metingarmenn eftir góðkenning frá nevndini.

Tað er komið fyri, at stjórnarlimir hava sitið longri enn formliga tilnevningarskeiðið uttan at vera endurvaldir ella avloystir av øðrum nevndarlimum. Tí verður mælt til at skriva í ásetingina, at nevndarlimirnir verða sitandi til nýggj nevnd er tilnevnd.

Eisini verður mælt til at strika heimildirnar hjá landsstýrismanninum um lánsveiting frá Realinum, soleiðis at tað verður nevndin, ið hevur evstu ábyrgd av útlánunum hjá Realinum.

**1.4 Ogn og lántøka (§6 og §7)**
Orðingarnar um ogn stovnsins eru ótíðarhóskandi og rættiliga torskildar. Í § 6 í løgtingslógini um Realin er ásett, at ognirnar hjá stovninum er grundfæi frá 1955, pluss tað, sum er komið afturat umvegis raksturin, síðan Realurin varð stovnaður við fólkatingslóg í 1955. Harumframt verður víst til ein tiltaksgrunn, men hesin tiltaksgrunnur er í veruleikanum ikki ogn hjá Realinum.

Tiltaksgrunnurin virkar soleiðis, at lántakarar hjá Realinum skulu rinda 1% av høvuðsstólinum í tiltaksgrunnin, tá ið teir taka upp lán frá Realinum. Henda upphædd verður rindað aftur til lántakaran, tá ið lánið er afturgoldið. Tiltaksgrunnurin er tí skrásettur sum skylda, og ikki sum ogn í roknskapinum hjá Realinum.

Mælt verður til at gera orðingarnar um ognarviðurskiftini meira tíðarhóskandi við at býta eginognina upp í ein høvuðsgrunn og ein eykagrunn, sum bert verður brúktur til rakstrarúrslit stovnsins. Lántakarar skulu tí ikki longur rinda innskot í tiltaksgrunn, tá ið teir taka upp lán frá Realinum.

Realurin hevur longu heimild til at útvega sær pening við lántøku. Ásett er í lógini at stovnurin kann læna upp til eina upphædd samsvarandi við 500% av høvuðsgrunninum um allir nevndarlimir taka undir við tí. Somuleiðis er ásett at stovnurin við góðkenning frá landsstýrismanninum kann læna upp til 700% av høvuðsgrunninum.

Hesi skuldarmørk stava frá gamlari tíð, tá ið stovnurin hevði lítlan og ongan eginpening. Seinastu 5 árini hevur skuldin ligið á umleið 35-40% av høvuðsgrunninum, so hesi mørk eru nú rættiliga ótíðarhóskandi. Mælt verður í staðin til, at stovnurin kann læna upp til eina upphædd samsvarandi við høvuðsgrunnin um allir nevndarlimir taka undir við tí. Somuleiðis verður mælt til at stovnurin, við góðkenning frá landsstýrismanninum, kann læna upp til 200% av høvuðsgrunninum. Hesi skuldarmørk verða mett at verða meira hóskandi í mun til hvussu stovnurin arbeiðir í dag.

Skotið verður harumframt upp, at tað verður í samráð við Landsbanka Føroya, at Realurin útvegar sær útlánspening.

**1.5 Útlán (§8 – 12)**
Ein natúrligur partur av virkseminum hjá lánistovnum er at akkordera skuld, t.e. at gera nýggjar avtalur um restskuld, tá ið umstøðurnar hjá lántakara broytast so grundleggjandi, at útlit ikki eru fyri, at hann megnar at rinda alla skuldina aftur. Hesar avtalur verða gjørdar, uttan at biðja um tvingsilssølu, tí mett verður, at fíggjarliga tapið hjá lánsveitaranum verður minni við akkorderingini enn við at biðja um tvingsilssølu, hóast partur av skuldini verður avskrivað við akkorderingini.

Spurningurin um heimildina hjá Realinum at akkordera skuld er rættiliga ógreiður, og tí hevur Realurin higartil verið afturhaldandi við at strika ella akkordera skuld. Realurin hevur tó í ávísum førum framt kreditorloysnir og strikað skuld, men tað hevur bert verið, tá ið tað hevur verið púra greitt, at stovnurin fór at fáa tap, líkamikið um biðið varð um tvingsilssølu ella ikki. Í hesum førum hevði umbønin um tvingsilssølu bert seinkað viðgerðina og gjørt tapið enn størri.

Ivaspurningarnir um heimildina kann tí virka forðandi fyri, at Realurin saman við øðrum kann vera við í kreditorloysnum, sum eru fíggjarliga skilagóðar fyri Realin.

Tí verður skotið upp, at ein beinleiðis heimild um at strika skuld ella gera aðrar kreditoravtalur verður sett í lógina um Realin, soleiðis at Realurin kann gera avtalur við sama innihaldi, sum aðrir lánistovnar gera sum natúrligan part av teirra virksemi.

Við striking av skuld verða vanliga gjørdar kreditoravtalur, har lánsveitarar luttaka á jøvnum føti við umfígging og umleggingum, har partar ella øll skuldin verður strikað, samstundis sum lánsveitarar, í styttri tíðarskeið, taka yvir ognarpartar í lántakandi felagnum við tí endamáli at avhenda teir aftur seinni, tá ið útlit eru fyri at fáa part av tapinum inn aftur tann vegin.

Í lógini um Realin er ásett, at stovnurin ikki kann veita lán til ein lántakara ella ein bólk av sínámillum samanbundnum lántakarum, ið fara upp um 25% av stovnsins ognum. Hesar orðingar eiga at verða gjørdar greiðari, soleiðis at tað er púra greitt, at tað er konsernhugtakið í vinnufelagslógini, ið meint verður við.

Dømi er um, at farið er upp um markið á 25%. Tí verður mælt til, beinleiðis at áseta í lógina, at um farið verður upp um markið á 25%, so skal stovnurin beinanvegin boða uttanhýsiseftirlitinum frá hesum, soleiðis at uttanhýsiseftilitið kann geva stovninum nærri boð um at fáa viðurskiftini í rættlag aftur.

**1.6. Eftirlit, roknskapur og grannskoðan (§13 – 16)**
Tað hevur í nógv ár verið Tryggingareftilitið, sum hevur útint eftirlitið við Realinum vegna landsstýsirmannin. Tí verður mælt til, at tað stendur beinleiðis í lógini, at tað er Tryggingareftirlitið, sum útinnir eftirlitið vegna landsstýrismannin. Harumframt verða gjørdar ymsar dagføringar um roknskap og ársfrásøgn, soleiðis at eftirlits-, roknskapar- og grannskoðaraviðurskiftini við Realinum verða meira tíðarhóskandi, og í samsvari við eigarapolitikk landsins.

Mælt verður til, at seta beinleiðis í lógina, at Realurin ikki skal takast við í løgtingsfíggjarlógina, men skrásetast í landsroknskapinum.

Realurin hevur ongantíð verið partur av fíggjarlógini, og tað hevði heldur ikki verið hóskandi, tí talan er um ein vinnurekandi stovn, sum virkar eftir marknaðartreytum.

Realurin er heldur ikki partur av landsroknskapinum. Her hevur Landsgransskoðanin fleiri ferðir víst á – seinast í frágreiðingini viðvíkjandi landsrokniskapinum fyri 2017 – at landsroknskapurin ikki er fullfíggjaður um slíkir grunnar liggja ikki verða tiknir við í landsroknskapin. Mælt verður tí til at áseta í lógina, at Realurin verður partur av landsroknskapinum.

**1.7 Útluting (§ 16a)**
Ásetingin um útluting verður dagførd og gjørd meira tíðarhóskandi og liðilig. Fyri at undirstrika sjálvstøðuna hjá stovninum verður mælt til at seta í viðtøkurnar reglur um útlutan av parti av úrslitinum. Landsstýrismaðurin skal góðkenna viðtøkurnar, og harvið ásetingarnar um, hvussu verður útlutað.

**1.8. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur ligið til almennar hoyringar á Hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Harumframt varð uppskotið sent beinleiðis til:

- Realin
- Felagið føroyskir peningastovnar
- Landsbanka Føroya
- Føroya Reiðarafelag
- Føroya Fiskimannafelag
- Føroya Skipara- og navigatørfelag
- Maskinmeistarafelagið
- Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
- Fiskimálaráðið
- Vinnuhúsið
- Tryggingareftirlitið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Fíggjarmálaráðið og Tryggingareftirlitið. Lógin verður nú greiðari og betur at umsita.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður, at uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna, bæði fíggjarligar og umsitingarliga, tí endamálið og heimildirnar hjá Realinum verða gjørdar greiðari og ruddiligari. Endamálið og lánsheimildirnar verða meira yvirskipaðar til at fevna um vinnulán til allar flótandi eindir við heimstaði í Føroyum, soleiðis at ongir skipabólkar og ongar vinnugreinar útihýsast frá at fáa fígging frá Realinum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður, at uppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki við sær gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar. Tó skal viðmerkjast, at umsitingin og mannagongdirnar viðvíkjandi dagliga virkseminum í Realinum verða greiðari og lættari við dagføringunum av lógini um Realin, sum eisini er endamálið við hesum uppskotinum.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Við hesum lógaruppskotinum verður endamálið og heimildirnar hjá Realinum gjørdar greiðari og ruddiligari. Endamálið og lánsheimildirnar verða meira yvirskipaðar til at fevna um vinnulán til før og flótandi eindir við heimstaði í Føroyum, soleiðis at ongir skipabólkar og ongar vinnugreinar útihýsast frá at fáa fígging frá Realinum.

Tað hava onkuntíð verið ivamál um, hvørji endamál Realurin kann veita fígging til. Tí ásetir uppskotið harumframt, hvørji endamál Realurin kann veita fígging til, nevniliga til nýbygningar, umbygging, keyp og sølu umframt umfígging.

**Til § 1, nr. 2**
§ 1, stk. 2. Heimildirnar eru við hesum uppskotinum greitt ásettar í stk. 1 og ásetingarnar um Hoyvíkssáttmálan eru ásettar í stk. 4 og 5. Tí verður heimildin hjá landsstýrismanninum at víðka útlánsvirksemið og orðingarnar um Hoyvíkssáttmálan strikaðar.

§ 1, stk. 2, verður ístaðin broytt til, at Realurin, í undantaksføri og í styttri tíðarskeið upp til 12 mánaðir, fær heimild til at loyva lántakarum hjá Realinum, at taka skip úr føroysku skipaskránni og skráseta skipið í fremmandari skipaskrá. Realurin metir seg ikki hava heimild til at fíggja skip, sum verða tikin úr føroysku skipaskránni, og tað hevur víst seg at verið óheppið, tá ið lántakarar hjá Realinum hava verið noyddir at taka skip úr føroysku skipaskránni fyri at skráseta skipið undir fremmandum flaggi í styttri tíðarskeið. Tí verður henda heimildin skotin upp.

**Til § 1, nr. 3**
§ 1, stk. 4, nr. 1. Talan er um konsekvensbroyting, tí skipasløgini í § 1, stk. 1, eru broytt.

**Til § 1, nr. 4**
§ 1, stk. 5. Talan er um konsekvensbroyting, tí Hoyvíkssáttmálin er ikki longur nevndur í § 1, stk. 2.

**Til § 1, nr. 5**
§ 2, stk. 1. Realurin verður stjórnaður av einari trímannastjórn, sum tilnevnir ein undirstjóra. Hetta verður mett sum ein leivd frá einari farnari tíð, tí stjórnin virkar í veruleikanum sum ein nevnd, meðan undirstjórin virkar sum stjóri. Mælt verður tí til at dagføra heitini soleiðis, at núverandi stjórn verður broytt til nevnd og undirstjórin verður stjóri.

§ 2, stk. 2. Ongar ásetingar eru í lógini, sum seta krøv til førleikarnar hjá nevndini. Skotið verður upp, at ásett verður, at nevndin samanlagt skal hava neyðuga vitan og royndir at kunna taka avgerðir á haldgóðum grundarlag. Tá nevndarlimir verða tilnevndir skal sostatt bæði hyggjast at førleikanum hjá einstaka nevndarliminum og eisini hjá nevndini samanlagt, soleiðis at vitan og royndir eru í nevndini, sum fevna um øll tey øki, sum eru viðkomandi fyri virksemi hjá Realinum. Her verður hugsa um vitan og royndir innan: fígging, búskap, leiðslu, samfelagsviðurskifti, fyrisiting, útgerðarvirksemi, sjóvinnu, fiskiveiði o.s.fr.

§2, stk. 3, Stjórnin hevur verið tilnevnd fyri 5 ár í senn, sum er eitt langt tíðarskeið, samanborið við valskeið hjá øðrum nevndum og ráðum í dagsins samfelag. Mælt verður tí til at stytta tilnevningina til 4 ár í senn, galdandi fyri nevndina, sum verður tilnevnd eftir at valskeiðið hjá núverandi stjórn er úti. Harumframt verður mælt til at nevndin umskarast soleiðis, at ikki øll nevndin verður skift út í senn. Hetta er fyri at tryggja kontinuitet í arbeiðnum hjá nevndini. Gjørt verður soleiðis, at tað aðruhvørja ferð verður skiftur ein nevndarlimur út og aðruhvørja ferð tveir limir. Tvey ár verða ímillum hvørja útskifting.

§ 2, stk. 4. Tað er komið fyri, at stjórnarlimir hava sitið longri enn formliga tilnevningarskeiðið uttan at vera endurvaldir ella avloystir av øðrum nevndarlimum. Tí verður mælt til at skriva í ásetingina, at nevndarlimirnir verða sitandi til nýggj nevnd er tilnevnd.

§ 2, stk. 5. Setanarviðurskiftini verða dagførd soleiðis, at tað verður stjórin, ið setir og loysir starvsfólk úr starvi, sí tó viðmekrkingina niðanfyri viðvíkjandi setan av metingarmonnunum.

§ 2, stk. 6. Av tí at avgerðir hjá nevndini um útlán frá stovninum í stóran eru grundaðar á virðismetingar framdar av metingarmonnum, eigur nevndin eisini at góðkenna setanir av metingarmonnum.

**Til § 1, nr. 6**
§ 3, stk. 1. Tað verður mett greiðari, fyrst at hava eina innleiðing um valið av umboðsnevnd.

Eisini verður broytt soleiðis, at Føroya Reiðarafelag velur 1 lim og Reiðarafelagið fyri Handilsskip velur 1 lim. Frammanundan valdi Føroya Reiðarafelag 2 limir og Reiðarafelagið fyri Handilsskip ongan lim. Ásetingin stavar frá tíðini, tá Realurin einans fíggjaði fiskiskip. Hetta er broytt, og verður tað mett meira hóskandi nú, at bæði feløgini velja hvør sín lim.

Orðingin til seinast, har víst verður til § 18, stk. 3, verður strikað, tí tað er ikki longur relevant hjá Fólkatinginum at velja limir í umboðsnevndina, tá eingin ríkisábyrgd longur er fyri útgivnum lánsbrøvum sambært § 18, stk. 3.

**Til § 1, nr. 7**
Í § 3, stk. 2, verður “stjórnin” broytt til “nevndin”. Talan er um konsekvensbroyting.

**Til § 1, nr. 8**
Í § 4 verður “stjórnini” broytt til “nevndini”. Talan er um konsekvensbroyting.

**Til § 1, nr. 9**
Í § 5, stk. 1, verður “Stjórar, undirstjórar og metingarmenn” broytt til “Nevndarlimir, stjóri og starvsfólk”. Talan er um konsekvensbroyting.

**Til § 1, nr. 10**
§ 5, stk. 2. Tað eigur at vera nevndin, ið undir øllum umstøðum tekur avgerð um lánsveiting sum evsta vald stovnsins, og tí verður mælt til at strika heimildina hjá landsstýrismanninum at taka avgerð um lánsveiting.

§ 5, stk. 3. Hvat persónur við tilknýti til Realin fremja av spekulatiónshandlum, sum einki hevur við Realin at gera, er teirra privata sak, so leingi tað ikki á nakran hátt ávirkar Realin. Tí verður mælt til at strika hetta pettið.

§ 5, stk. 4., sum verður til stk. 2. Tað verður mælt frá, at landsstýrismaðurin skal hava nakran leiklut í sambandi við upptøku av láni frá stovninum. Skotið verður upp, at nevndarlimur, stjóri ella grannskoðari ikki kunnu taka lán frá stovninum. Tað verið seg beinleiðis ella óbeinleiðis, eitt nú gjøgnum feløg, har viðkomandi hava eina avgerandi ávirkan. Her verður hugsað um ásetingarnar í vinnufelagslógini viðvíkjandi nágreining av hugtakinum "avgerandi ávirkan" í koncern samanhangi. Harafturímóti, um viðkomandi persónar hava eitthvørt tilknýti til feløg, men á ongan hátt nakra avgerandi ávirkan, so verður mett óheppið, at viðkomandi felag ikki kann fáa lán.

**Til § 1, nr. 11**
§ 6, stk. 1. Mælt verður til at gera orðingarnar um ognarviðurskiftini meira tíðarhóskandi við at býta eginognina upp í ein høvuðsgrunn og ein eykagrunn. sum bert verður brúktur til rakstrarúrslit stovnsins. Lántakarar skulu tí ikki longur rinda innskot í tiltaksgrunn, tá ið teir taka upp lán frá Realinum.

§ 6, stk. 2. Orðið "tiltaksgrunnurin verður broytt til "eykagrunnurin", og orðið "samlaðu" verður strikað, tí tá útlán stovnsins verða gjørd upp eftir hesi grein, er talan um nettoútlán. Tað merkir, at hædd er tikin fyri niðurskrivingum vegna væntandi tap.

Orðingarnar í § 6, stk. 3, eru ikki tíðarhóskandi longur, og mælt verður tí til meira tíðarhóskandi orðingar um plasering av gjaldførinum hjá stovninum, sum framvegis skal vera trygg.

§ 6, stk. 4, verður strikað. Tað hevur onki endamál longur, tí ásetingin um tilstaksgrunn verður strikað.

**Til § 1, nr. 12**
Í § 7, stk. 1, verður orðingin "umframt grundfæið" strikað. Talan er um konsekvensbroyting.

Eisini verður lagt afturat, at stovnurin kann útvega sær útlánspening við vanligari lántøku. Hetta er einans fyri at tryggja, at lógarteksturin ikki skal geva tað fatan, at Realurin ikki hevur møguleika fyri at taka eina vanliga bankafígging, kassakreditt ella líknandi.

**Til § 1, nr. 13**
Í § 7, stk. 2, verður "øllum stjórnarlimunum" broytt til "allari nevndini". Talan er um konsekvensbroyting.

**Til § 1, nr. 14**
Í § 7, stk. 3, verður "grundfæið" broytt til "høvuðsgrunn". Talan er um konsekvensbroyting.

Men eisini verður skuldarmarkið lækkað. Stovnurin kann nú – uttan góðkenning frá landstýrismanninum – læna upp til eina upphædd, sum samsvarar við høvuðsgrunnin. Frammanundan var talan um 5 ferðir høvuðsgrunnin.

**Til § 1, nr. 15**
Í § 7, stk. 4, verður "stjórnini" broytt til "nevndini og Landsbanka Føroya" og "grundfæið" verður broytt til "høvuðsgrunnin". Talan er um konsekvensbroytingar, umframt at Landsbanki Føroya nú eisini er settur inn í tekstin, soleiðis at landsstýrismaðurin bæði skal hava tilmæli frá nevndini í Realinum og Landsbanka Føroya.

Men eisini verður skuldarmarkið lækkað. Stovnurin kann nú – við góðkenning frá landstýrismanninum – læna upp til eina upphædd, sum samsvarar við 2 ferðir høvuðsgrunnin. Frammanundan var talan um 7 ferðir høvuðsgrunnin.

**Til § 1, nr. 16**
Í § 7, stk. 5, verður "grundfæ" broytt til "høvuðsgrunnin". Talan er um konsekvensbroyting.

**Til § 1, nr. 17**
§ 7, stk. 6. Tað verður ásett, at Realurin skal ráðføra seg við Landsbanka Føroya í sambandi við lántøku.

**Til § 1, nr. 18**
§ 8, stk. 1 og stk. 4, í núverandi lóg verða skrivaðar saman undir § 8, stk. 1, og orðingarnar verða broyttar samsvarandi konsekvensbroytingum og dagføringum av lógini annars.

**Til § 1, nr. 19**
§ 8, stk. 4, er lagt saman við stk. 1, og tí verður § 8, stk. 5, í verandi lóg til § 8, stk. 4, í hesum lógaruppskotinum.

§ 8, stk. 5. Realurin fær við hesi áseting beinleiðis heimild til at gera kreditor avtalur og strika skuld, á sama hátt, sum aðrir lánistovnar vanliga gera. Eisini fær stovnurin í sambandi við kreditoravtalur heimild til at reka annað virksemi enn tað, sum er ásett í endamálsorðingini í §1.

§ 8, stk. 6. Ásetingarnar í lógini um, at Realurin ikki kann veita lán til ein lántakara ella ein bólk av sínámillum samanbundnum lántakarum, ið fara upp um 25% av stovnsins ognum, verða her gjørdar greiðari, soleiðis at tað er púra greitt, at tað er konsernhugtakið í vinnufelagslógini, ið meint verður við. Tað verður somuleiðis beinleiðis ásett í lógina, at um farið verður upp um markið á 25%, so skal stovnurin beinanvegin boða uttanhýsiseftirlitinum frá hesum, soleiðis at uttanhýsiseftirlitið kann geva stovninum nærri boð um at fáa viðurskiftini í rættlag aftur.

Í § 8, stk. 7, verður orðið "stjórnarlimum" broytt til "nevndarlimum" og tilvísingin til § 5, stk. 2, verður strikað, tí hetta stykkið er strikað í hesum lógaruppskotinum, sí frammanfyri. Talan er um konsekvensbroytingar.

**Til § 1, nr. 20**
Í § 8, stk. 8, verður "stjórnin" broytt til "nevndin". Talan er um konsekvensbroyting.

**Til § 1, nr. 21**
§ 8, stk. 9. Skipanin við tiltaksgrunni er ikki tíðarhóskandi og mælt verður tí til at strikað hetta stykkið, sí annars viðmerkingar frammanfyri.

§ 8, stk. 10, er ikki tíðarhóskandi og mælt verður tí til at strikað hetta stykkið, sí annars viðmerkingar frammanfyri.

**Til § 1, nr. 22**
Í § 9, stk. 2, verður "stjórnini" broytt til "nevndini" og "veðbrævatreytunum" verður broytt til "lánsskjølunum". Talan er um konsekvensbroyting, men Realurin hevur harumframt ætlanir um at fara frá veðbrævi sum trygdarskjali til onnur trygdarskjøl og lánsskjøl annars, og tí verður mælt til at broyta orðið "veðbrævartreytunum" til "lánsskjølunum".

**Til § 1, nr. 23**
§ 10 verður strikað, tí at lántakarar hefta solidariskt mótvegis stovninum er leivd frá farnari tíð, sí annars viðmerkingar frammanfyri.

**Til § 1, nr. 24**
§ 13, stk.1. Tað hevur í nógv ár verið Tryggingareftilitið, sum hevur útint eftirlitið við Realinum vegna landsstýsirmannin. Tí verður orðingin broytt, soleiðis at tað stendur beinleiðis í ásetingini, at landsstýrismaðurin kann gera avtalu við avvarðandi landsstýrismann um, at Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við stovninum.

**Til § 1, nr. 25**
§ 14, stk. 1. Orðingarnar um uppsetan av ársfrásøgnini verða dagførdar og gjørdar meira tíðarhóskandi.

§ 14, stk. 2. Roknskaparár Realsins gongur frá 1. apríl til 31. mars. Mælt verður í staðin til at broyta hetta til álmanakkaárið, sum verður mett meira tíðarhóskandi.

§ 14, stk. 3-4. Ásetingar um ársfrásøgn stovnsins.

**Til § 1, nr. 26**
§ 15, stk. 1. Skotið verður upp at hava meira tíðarhóskandi orðingar um uppsetan av ársfrásøgn o.s.fr.

§ 15, stk. 2, verður strikað, tí mett verður, at við broytingunum í §§ 13-15 er ikki neyðugt at útgreina reglurnar um grannskoðanina í viðtøkunum.

**Til § 1, nr. 27**
§ 16, stk. 1. Her er talan um konsekvensbroytingar, tí orðingarnar um ársfrásøgn og ársroknskap í ásetingunum frammanfyri eru dagførdar og gjørdar meira tíðarhóskandi.

§ 16, stk. 2. Orðið “stjórnin” verður broytt til “stovnurin” og “úrtak av roknskapum stovnsins.” verður broytt til “roknskap fyri farna ársfjórðing.” samstundis sum freistin verður broytt frá einum til tveir mánaðir eftir hvørt fjórðingsárslok at senda landsstýrismanninum roknskap.

**Til § 1, nr. 28**
§ 16 a. Ásetingin um útluting verður dagførd og gjørd meira tíðarhóskandi, soleiðis at hon kemur at líkjast meira reglunum um vinnulig feløg, ið virkað undir vinnufelagslógini. Nevndin í vinnuligum feløgum leggja á ársaðalfundinum uppskot fyri eigararnar um útluting av vinningsbýti. Tí verður skotið upp, at nevndin í Realinum á hvørjum ári leggur fram fyri landsstýrismannin uppskot um útluting av vinningsbýti. Tað er landsstýrismaðurin, ið umboðar eigaran.

**Til § 1, nr. 29**
§18, stk. 2 og 3 verða strikað, tí tey eru ikki viðkomandi longur.

**Til § 2**
Stk. 1. Áseting um gildiskomu.
Stk. 2. Skiftisregla í sambandi við at nevndir frameftir skulu umskarast.
Stk. 3. Skiftisregla í sambandi við broyting í roknskarparárið.

Stk. 3. Skiftisregla í sambandi við broyting í umboðsnevnd.

Fíggjarmálaráðið, 1 apríl 2019.

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur